# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Siggu Olsen** verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 13.

**Klara Djurhuus úr Søldarfirði** andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi fríggjadagin, 79 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju mikudagin kl. 14.

**Klara Djurhuus**

andaðist á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi
26. juni, 79 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju
mikudagin kl 14.00.

**Familjan**

**Prógv**



26. juni fingu Kristin Vágsá Stampe, Klaksvík, Durita Hilduberg, Tórshavn, og Crista Dahl Mikkelsen, Vágur, prógv sum bachelor á Professionshøjskolen UCC, Pædagoguddannelsen København.

Lesið Sosialin

**Dagurin**
**30. juni. Lucina**, deyð umleið ár 100. Kristin kona, sum sigst at hava verið upplærd av ápostlunum sjálvum. Annars er dagurin eisini ein av pálsmessunum. Andras Samuelsen doyði hendan dagin í 1954.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Reimund til Kambodja

**Heimamissiónin sendir fyrsta volontør til Kambodja**



Kirkjuliga Heimamissiónin hevur sett Reimund Langgaard úr Leirvík sum volontør frá 1. juli fram til ársskiftið, har starvsstaðið verður í Siem Reap í Kambodja.

Reimund Langgaard er kendur í Heimamissiónini, bæði sum fyrrverandi starvsfólk og eisini í staðbundna arbeiðinum. Uppgávan verður fyrst og fremst at virka í ungdómsarbeiðnum og undirvísa í enskum. Tó kemur Reimund eisini at hjálpa staðbundnu kirkjuni við verkætlanum, sum skulu hjálpa henni at klára seg sjálva fíggjarliga.

Reimund kemur frá starvinum sum varasølustjóri í Smyril Line. Hann hevur eisini verið virkin í missiónsarbeiðinum, og millum annað sitið í stýrinum í Meinigheitshúsinum í Havn seinastu tvey árini. Bøn verður fyri Reimund í Leirvíkar Missiónshúsi sunnudagin 21. juni kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Heri Kjærbo, leiðari á Boðanardeildin hjá Heimamissiónini, sigur, at hetta er fyrsta stig í at røkka málinum at senda fleiri starvsfólk til kirkjuna í Kambodja.

# Próvtøkur á Tekniska skúla

**Fríggjadagin 26. juni fingu elektrikarar, rørsmiðir, húsasmiðir, bilsmiðir, byggitøkningar og SIT-næmingar prógv á Tekniska Skúlanum í Tórshavn**

*Myndir: Tekniski Skúlin í Tórshavn*



**Elektrikarar f.v.:** Bergur Sørensen, Hoyvík, Edward I. Leo, Vestmanna, Magnus Hendriksson Olsen, Skálavík, Pætur í Skemmuni, Porkeri, Páll Gazet Patursson, Kirkjubøur, Petur Djurhuus, Hoyvík, Sigmund Kári Hentze, Eiði, Sjúrður Rubeksen, Argir, og Thomas Jul Haraldsen, Miðvágur.



**SIT-næmingar f.v.:** André Hentze Johansen, Sandavágur, Anisha Lassen, Kollafjørður, Fríðálvur Áki Joensen, Sandur, Hugin Terji Dal Christiansen, Tórshavn, Kristine M.I.S. Poulsen, Leynar, Sigtór A. Petersen, Sørvágur, og Teitur Jacobsen, Hoyvík.

**Framhald á síðu 33**